gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Føroyingar manna oljuskrivstovu



*Tey fýra fólkini, sum koma at hava tilknýti til skrivstovuna hjá Agip í komandi tíð fv. Mildrid Jacobsen, skrivari, Ingi Højgaard, stjóri, Ólavur Gregersen, ráðgevi og Ron Lansdell, verkætlanarstjóri fyri Føroyaøkið.*

**Trý av teimum fýra fólkunum á skrivstovuni hjá oljufelagnum Agip eru føroyingar.**

OLJUFELAG Á BRYGGJUBAKKA
*Jan Müller*

Italska oljufelagið Agip, sum er partur av risastóra ENI-samtakinum, hevur stórar ætlanir og vónir í Føroyum. Felagið fekk í fjør tilluttað tvey leitiloyvi og ætlar sær undir at bora á sumri 2002. Ron Lansdell, sum dagliga starvast í Aberdeen, er verkætlanarstjóri á nýggju føroysku skrivstovuni hjá felagnum. Tað er hann, sum kemur at standa fyri komandi leiting. Hann hevur ferðast aftur og fram millum Aberdeen og Føroyar nú í meira enn trý ár og er tað ein stórur dagur, nú felagið alment hevur latið upp skrivstovu á Bryggjubakka í Havn. Umleið 15 fólk frá feløgunum hjá Agip í Bretlandi og Danmark vóru við til almennu upplatingina av skrivstovuni.

– Føroyar eru eitt av teimum mongu londunum, har Agip hevur sett sær sum mál at leita eftir olju og gassi. Okkum dámar væl her og halda, at komandi tíðin fer at verða ein stór og spennandi avbjóðing fyri bæði okkum og føroyska samfelagið.

Hann leggur stóran dent á at kunna arbeiða saman við føroyingum og er ikki sørt errin av, at trý av teimum fýra starvsfólkunum, sum í løtuni eru knýtt at skrivstovuni í Havn eru føroyingar. Tey eru stjórin í felagnum, Ingi Højgaard, Ólavur Gregersen, ráðgevi og Mildrid Jacobsen, skrivari. Haraftrat er so Ron Lansdell frá Agip í Onglandi.

Agip hevur bundið seg til at bora ein brunn. Ron Lansdell sigur, at teir eru sera væl nøgdir við prospektið, sum teir hava valt at kalla »Marimas«, ið er ein av persónunum í kendari skaldsøgu. Prospektið er í heimsflokki sigur hann.

Agip hevur 93% í tí loyvinum, har teir skulu til at bora næsta ár. Føroyska felagið Føroya Kolvetni eigur 7% í loyvinum, men kann økja sín part til 22%. Sosialurin skilur, at pláss er fyri øðrum oljufeløgum í loyvinum men Ron Lansdell er tó rættiliga varin at gera viðmerkingar til hetta. – Latið okkum nú bíða og síggja, hvat hendir.

Ron Lansdell hevur annars stórar vónir til tað ráðgevandi arbeiðið, sum Ólavur Gregersen nú er farin undir. – Vit eru sera væl nøgdir við hann og ivast ikki í, at hansara ráðgeving fer at koma føroyskum virkjum væl við. Vit skulu so gera alt vit eru mentir fyri at skapa honum tær røttu umstøðurnar at arbeiða undir. Vónandi er hetta eitt gott íkast til at fáa føroyskt vinnulív uppí eina komandi oljuvinnu.



*Nógv fólk leitaði sær inn á gólvið hjá Agip á Bryggjubakka, tá almenn móttøka var har hósdagin og ikki minst fólk, sum í sínum dagliga arbeiði koma at hava tilknýti til oljuvinnuna. Her umboð frá Vaktar- og Bjargingartænastuni og Atlanticon saman við Pablo Fiores, leitingarstjóra hjá Agip*




*Nøkur av oddafólkunum hjá Agip í Onglandi og Danmark saman við føroyskum starvsfólki uttan fyri skrivstovuna á Bryggjubakka.*

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Agip sett føroying at ráðgeva í oljumálum

**Til tess at kunna veita føroyskum fyritøkum og virkjum eina professionella ráðgeving hevur oljufelagið Agip sett Ólav Gregersen, búskaparfrøðing at taka sær av hesi avbjóðandi uppgávu**

OLJURÁÐGEVING
*Jan Müller*




*Høvuðsstjórin hjá Agip í Bretlandi, Antonio Iannello, ynskir nýggjasta spíranum á føroysku greinini hjá Agip, Ólavi Gregersen tillukku við nýggja starvinum.*

1. mai tók Ólavur Gregersen, fyrrverandi leiðari á TK-stovuni, við sum ráðgevi hjá føroysku greinini av stóru altjóða oljufyritøkuni Agip, sum hevur røtur sínar í Italia. Endamálið við nýggja starvinum er at ráðgeva føroyskum virkjum og fyritøkum, sum ætla sær at arbeiða í eini komandi føroyskari oljuvinnu.

Ólavur var við til móttøkuna hjá Agip Faroes Branch, tá felagið alment tók nýggju skrivstovu sína undir Bryggjubakka í Havn í brúk í farnu viku. Umframt hann eru tveir aðir føroyingar knýttir at skrivstovuni, sum heldur til í báðum teimum niðastu hæddunum í fyrrverandi bygninginum hjá felagnum Trygd. Eitt skifti helt oljufelagið Texaco til hølunum, men tá felagið ikki fekk tillutað nakað leitiloyvi á føroyska landgrunninum, tók felagið seg – í hvussu er fyribils – úr Føroyum og lat harvið dyrnar upp fyri starvsfeløgunum úr Agip.

Og tað er einki at dylja yvir, at Ólavur Gregersen dámar væl at verða komin inn í hitan hjá einum av teimum stóru oljufeløgunum. Hann heldur tað verða eina stóra og spennandi avbjóðing at skula ráðgeva føroyskum fyritøkum í oljuspurningum, ikki minst tí hann hesi seinastu árini nettupp hevur tikist við at ráðgeva føroyskum fyritøkum, um ikki í oljumálum so kortini innan týðandi vinnuspurningar, sum eisini náttúrliga fara at hoyra inn undir nýggja karmin at ráðgeva í oljuspurningum.

Ólavur Gregersen er 32 ára gamal og hevur útbúgving sum búskaparfrøðingur við sergrein innan altjóða handil. Hann hevur eisini roynt seg innan føroyskt vinnulív. Eitt nú var hann við til at stovna Tøting í Gøtu og kennir tí fortreytirnar hjá eini føroyskari fyritøku at arbeiða í samfelagnum. Áðrenn hann fór á TK-stovuna var hann rættiliga virkin í Vinnuhúsinum og kom har at kenna tað føroyska vinnulívið.

– Mær dámdi sera væl á TK-stovuni, so tað var ikki nøkur løtt avgerð at taka av hesum nýggja tilboðnum. Men eg haldi hetta vera eitt sera spennandi starv, hetta at skula royna at hækka førleikan hjá vinnuni, soleiðis at føroyskar fyritøkur veruliga fáa ein møguleika at vera við í oljuvinnuni.

Ólavur sigur seg hava fylgt væl við, hvat er hent á oljuøkinum seinastu árini. Nú verður tað so áhugavert at kunna koma tættari uppá vinnuna og síggja, hvat hendir á hesum øki.

Hann sær fram til at koma at læra nógv, nú nýggja ráðgevingaruppgávan stendur fyri framman. Her verður tað av stórum týdningi at kunna fáa upplýsingar og vitan um oljuvinnu víðari til føroyskar fyritøkur. Arbeiðið verður bæði ráðgeving til føroyskar fyritøkur, men tað verður so eisini uppgávan at hjálpa til at skipa fyri skeiðum, seminarum ol.

## Bein aftrat

Ólavur Gregersen heldur oljuvinnuna vera eitt gott høvi hjá føroyska samfelagnum at fáa eitt bein aftrat at standa á. – Tað er eitt sera gott høvi hjá føroysku vinnuni at venja seg við krøv frá útlendsku keyparunum, tí tey eru í flestu førum øðrvísi enn krøvini frá føroysku keyparunum.

Hann heldur, at man skal sjálvandi vera sera varin við ikki at kolrenna føroyska samfelagið, tí er tað eisini umráðandi, at tað eru fólk, sum hava eina heildarmynd av hesi vinnu og sum eisini taka atlit til tey mentanarligu og tær sosialu virðini. – So tá vit tosa um oljuvinnu er tað ikki bara ein spurningur um vinnu men eisini um onnur viðurskifti í samfelagnum.

Fyrsta uppgávan verður at útgreina nærri, hvussu ráðgevingaruppgávan skal skipast og setast í verk. Um ikki so langa tíð verður greitt frá, hvussu tilboðini til føroyskar fyritøkur verða skipað. Hóast hann skal arbeiða fyri eitt útlendskt oljufelag, so verður uppgávan at fevna um alt vinnulívið, sum so aftur skal arbeiða saman við øllum oljufeløgunum.

Ólavur Gregersen er nýggjur hjá Agip men hann hevur ta fatan, at talan er um eitt sera professionelt felag, har tú eisini finnur eina sera hugnaliga atmosferu. – Tað er vert at leggja til merkis, at her í løtuni eru fleiri føroyingar útlendingar. Tað verður annars spennandi at arbeiða saman við útlendingum í eini altjóða fyritøku og har tú eisini hevur samstarvsfelagar, sum eru føroyingar.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður ynskir Ólavi Gregersen tillukku við starvinum.*

*Myndir: Jan Müller*